# Njál Djurhuus í norskum filmi



*Umframt leiklutin sum prestur í ”Gatas Gynt” hevur tað verið uppgávan hjá Njál Djurhuus at fáa tey heimleysu og misn‡tarar klárar til upptøkurnar til filmin*

**Kendi føroyski majorurin í Frelsunarherinum, Njál Djurhuus er nú at síggja í norskum filmi, har hann spælir saman við teimum heimleysu á gøtunum í Oslo**

FILMUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Nordisk Film*

- Eg vil vísa, at tá saman um kemur, er ongin munur á einum ”bumsi” á gøtuni og einum millióningi í fínum klædningi. Í síðsta enda eru vit øll bara menniskju.

Soleiðis sigur eldsálin Njál Djurhuus um nýggja filmin ”Gatas Gynt”, sum lýsir tey menniskju á gøtuni í Olso, hann hevur arbeitt við í út við 30 ár.

Nú Njál Djurhuus skjótt fer frá fyri aldur, fegnast hann um at kunna leggja ein slíkan film eftir seg. Filmurin er nevniliga ein heiður til hansara børn á gøtuni, sum hann kallar misnýtararnar og tey heimleysu, sum altíð hava havt eitt serligt pláss í hjartanum hjá Njál Djurhuus.

### Minni og heiður

Sjálvur hevur Njál Djurhuus ein lítlan leiklut í filminum sum prestur. Annars hevur hansara uppgáva verið, at fáa tey heimleysu og misnýtararnar klár til upptøkurnar.

- Tað var ikki altíð so lætt. Onkuntíð leitaði eg á gøtunum til langt út á náttina eftir teimum. So var bara at fáa tey í bað sum skjótast, so tey kundu vera klár til dagin eftir. Tann eini hevur hundin hjá sær við í filminum, so onkuntíð mátti hundurin eisini ein túr í baðikarið, flennir Njál Djurhuus hjartaliga.

Eftir næstan 30 ár millum misnýtarar og heimleys á gøtuni í Oslo er tað lítið, sum kann skaka Njál Djurhuus longur. Hann dylir tó ikki yvir, at tað neit fast, tá tveir av leikararnum doyðu, stutt áðrenn tey fóru í gongd við upptøkurnar í fjør.

- Teir hildu tíverri ikki til harða lívið á gøtuni í longdini og bukkaðu undir. ”Gatas Gynt” er ikki minst eitt minni um teir báðar,